# Ránsveiðan í Norðuratlantshavi munandi minkað

**Umfatandi samstarv ímillum londini í Norðuratlandshavi hevur ført við sær, at seinastu tvey árini er ránsveiðan munandi minkað, men enn er neyðugt at vera á varðhaldi, er niðurstøðan hjá Tórbirni Jacobsen, fiskimálaráðharra eftir fund millum fiskimálaráðharrarnar á Malta í hesi vikuni**

RÁÐHARRAFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hesi seinastu tvey árini er ránsveiðan í altjóða sjógvi í Norðuratlantshavi minkað munandi.

Tað er niðurstøðan á fundi á Malta fyrr í hesi vikuni ímillum fiskimálaráðharrarnar í londunum í Norðuratlantshavi.

Fiskimálaráðið sigur í tíðindaskrivi, at tað er umfatandi samstarvið ímillum londini kring Norðuratlantshavið og í gjøgnum NEAFC og NAFO um eftirlit, sum hevur elvt til, at ránsveiðan í altjóða sjógvi í Norðuratlantshavi munandi minkað.

Her er serliga talan um kongafisk í Irmingarhavi og tosk í Barentshavi.

- Tó eru framvegis neyðugt at vera á varðhaldi og at styrkja samstarvið enn meira, serliga við lond í Asia og Afrika, har fiskur úr Norðuratlantshavi eisini verður avreiddur.

Landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, Tórbjørn Jacobsen, var við á fundinum á Malta, saman við ráðharrunum úr Kanada, Noregi, Íslandi og Grønlandi, umframt umboðum fyri Russland.

Verturin fyri fundin í ár var ES kommisserurin fyri fiskivinnumál, Joe Borg, sum sjálvur er av Malta.

Stríðið ímóti ólógliga fiskiskapinum hevur staðið við í nøkur ár og nógv framstig eru gjørd, men hetta er ein tilgongd, sum má halda fram.

Næstu stigini í hesum arbeiðnum verður at skipa sporføri fyri at avmarka marknaðaratgongdina hjá fiski, sum er fiskaður ólógliga, uttan at leggja forðingar fyri lógliga fiskaðan fisk.

- Ráðharrarnir staðfestu, at ólógligi fiskiskapurin í Norðuratlantshavi er ein heimsumfatandi trupulleiki. Samstundis sum havnirnar í Evropa eru stongdar fyri skipum, sum fiska ólógliga, verður fiskurin nú avreidd í Vesturafrika og í Asia. Tí er tørvur á at samstarva við fleiri lond og at hjálpa menningarlondum at styrkja teirra førleika at taka lut í samstarvinum, sigur Fiskimálaráðið.

- Ráðharrarnir vóru samdir um at skipa fyri eini felags alheims ráðstevnu at seta gongd á víðkaða samstarvið.

Á fundinum á Malta fingu ráðharrarnir eisini kunning um seinasta nýggja í sambandi við veðurlagsbroytingar og avleiðingar fyri fiskivinnu.

Í hesum sambandi greiddi Tórbjørn Jacobsen í stuttum frá um veðurlagsráðstevnuni í Føroyum í apríl og ætlanina at menna granskingardepil í Føroyum fyri veðurlag og havgransking.

Burðardygg gagnnýtsla av øllum havsins livandi tilfeingi varð eisini umrødd.

Í hesum sambandi var kópaveiða serliga tikin fram, og londini í Norðuratlansthavi, har kópur verður veiddur, gjørdu vart við sína ónøgd um, at ávís ES lond hava sett innflutningsbann ímóti kópaskinnum. Bæði Føroyar og onnur lond rund í Norðuratlantshavi, har burðardygg gagnnýtsla av havsúgdjórum hevur stóran týdning, fara at venda aftur til hesar spurningar á framtíðar fundum á ráðharrastigi.



*Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, og Helga Pedersen, fiskmálaráðharri í Noregi, sluppu eisini ein stimitúr á Malta*



*Fiskimálaráðharrarnir úr Norðuratlantshavinum, frá vinstru: Loyola Hearn úr Kanada, Tórbjørn Jacobsen, úr Føroyum, Einar K. Guðfinnsson úr Íslandi, Helga Pedersen úr Noregi, Joe Borg, ES kommisserur, Alexander Okhonov, umboð fyri Russland og Finn Karlsen úr Grønlandi*

# Leita eftir oljudálkara

**Roynt verður nú at finna tann, sum slepti nógvari olju á sjógv norðanfyri Føroyar og tey hava nøkur skip av velja ímillum**

OLJDÁLKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni varnaðist verjuskipið Hvidbjørnen ein stóran oljublett í sjónum einar 35 fjórðingar norðanfyri Føroyar.

Talan var um rættiliga nógva olju, tí bletturin var 10 fjórðingar langur og einar 100 metrar breiður og tað sást, at tað var nógv olja, tí summastaðni fleyt hon tjukk á sjónum, sigur Løgreglan.

Ì hesum sambandi skrásetti Hvidbjørnen hvørji skip vóru stadd í økinum og hevur handað føroyskum myndugleikum nøvnini á teimum skipum, sum oljan kann hugsast at stava frá. Talan er um útlendsk skip og samstundis tók verjuskipið eina roynd av oljuni.

Seinni er so ein trolari, sum var í økinum um hetta mundi, komin inn í føroyska havn og føroyskir myndugleikar fóru so umborð at taka royndir av oljuni umborð fyri at staðfesta um oljan stavaði frá hesum ávísa skipinum.

Enn er úrslitið av royndini ikki komin.

Johanna Olsen, deildarleiðari á Umhvørvisstovuni, sigur, at helst er talan um tungolju ella spillolju, men tað er ikki endaliga staðfest.

Hon sigur, at tá ið fráboðanin kom, var apparatið sett ígongd, fyri at meta um, antin oljan kann reka á land í Føroyum og hvønn skaða hon í so fall kundi gjørt á fugl, annað livandi og náttúruna.

Men serfrøðingarnir meta, at tað er ósannlíkt, at oljan fer at reka á land og tá ið tað samstundis er ógvuliga kostnaðarmikið at taka hana upp, er avgjørt at lata hana liggja.

Eydnast at staðfesta, hvaðani oljan stavar, verður tað reist sum ein sak ímóti skipinum og so gongur tað sína vanligu gongd, tí talan er brot á havumhvørvislógina.

Men hon leggur afturat, at tað er als ikki vist, at tað eydnast at finna skipið, sum hevur skyldina av dálkingini.

Hóast oljudálkingin er uttanfyri 12 fjórðingar, er talan um føroyskt myndugleikaøki og Føroyar eru við í altjóða avtalum á økinum.

Johanna Olsen sigur, at tað er ikki ofta, men tað kemur fyri av og á, at tey fáa fráboðanir um oljudálking og fæst prógv fyri, hvør hevur slept olju á sjógv, verður málið reist og so fær tað tær avleiðingar, sum lógin ásetur.

Seinast tey fingu fráboðan um, at oljudálking, var tað ein fylgissveinamynd, sum avdúkaði at illgruni var um eina oljudálking.



*Ein stórur oljublettur var at síggja á sjónum norðan fyri Føroyar í farnu viku og um vikuskiftið tóku tey royndir av oljuni á einum útlendskum trolara, sum var komin í føroyska havn*